# Rundskriv nr. 1 (2021)

## um FIFA anti-doping reglugerð

1. Altjóða fótbóltssamgongan FIFA hevur samtykt nýggja anti-doping reglugerð (FIFA ADR), sum tekur støði í *World Anti-Doping Code* hjá *World Anti-Doping Agency* (WADA), ið kom í gildi 1. januar 2021.

2. Nevnda anti-doping reglugerð hjá FIFA verður við hesum í øllum lutum sett í gildi fyri føroyskan fótbólt og er bindandi fyri teir partar sum eru nevndir í *Article 1* í FIFA ADR.

3. Fótbóltssamband Føroya (FSF) samstarvar við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um dopingeftirlit v.m., og fylgir teimum mannagongdum sum ÍSF hevur ásett í hesum sambandi samsvarandi galdandi dopingreglugerð hjá ÍSF.

4. Um ósamsvar er ímillum anti-doping reglugerðina hjá ÍSF og FIFA, tá er FIFA anti-doping reglugerðin galdandi.

5. Hetta rundskriv er samtykt av Starvsnevndini í Fótbóltssambandi Føroya og kemur í gildi 7. januar 2021.

./. Hjálagt hesum rundskrivi er anti-doping reglugerðin hjá FIFA, sum hetta rundskriv vísir til.

Fótbóltssamband Føroya,

7. januar 2021



Virgar Hvidbro,
aðalskrivari.